

## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*

# FÓLKAFLOKKURIN UTTANFYRI

Orðaskiftið á tingsins fyrsta fundardegi, nú ólavsøkurøða løgmans var til umrøðu, var heldur tamt. Ikki kann sigast, at tað er tann stóri orðadrátturin millum samgongu og andstøðu – og stundum er ilt at meta um, hvør nú er í samgongu og hvør, ið er í andstøðu.

Politiska myndin er kám. Løgmaður legði nógv mál fram í ólavsøkurøðuni, sum semja als ikki hevur verið um. Okkurt kundi bent á, at løgmaður er farin at koyra eina harðari linju. Men Soleiðis er løgmaður ikki. Neyvan heldur hava fólka- og javnaðarfólk svølgt nógvar kamelar: Sjómannafrádrátturin og tilfeingisgjaldið, sum Fólkaflokkurin ikki vil nerta, og so ætlanina um at leggja niður røktarheimspláss, sum Javnaðarflokkurin hevur tikið frástøðu frá. Men tað er ikki bara orðaskiftið á tingi, sum bendir á, at tað kámast millum samgongu og andstøðu. Tað gjørdu fleiri floksformenn greitt í Degi og Viku í gjárkvøldið.

Jákup Mikkelsen, formaður Fólkafloksins á tingi váttaði, at flokkur hansara als ikki tekur undir við nógvum hjá løgmanni. Hann heldur, at ein løgmansrøða eigur at snúgva seg um tað, sum samgonguflokkarnir eru samdir um og kunnu fáa ígjøgnum. Hetta tykiskt nú logiskt, men politikkur er nú als ikki altíð so logiskur og lættur at skilja.

John Johannesen, formaður Javnaðarfloksins á tingi, legði í síni framsøðurøðu dent á, hvussu framúrskarandi samstarvsvilja Tjóðveldi hevur víst seinastu tíðina við at føra konstruktivan politikk saman við pørtum av samgonguni. Høgni Hoydal vísti í Degi og Viku á, at einasta leiðin til konstruktivan andstøðupolitikk er at taka av, tá tey kunnu fáa undirtøku fyri sínum politikki, eins og tey eisini kunnu taka undir við tí góða, sum kemur frá pørtum av samgonguni.

Alt bendir á, at vit í veruleikanum hava eitt minnilutastýri, har Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin geva Fólkaflokkinum okkurt slag av fríspæli, meðan hesir



flokkar kunnu føra veruligan politikk saman við Tjóðveldinum – uttan um Fólkaflokkin.

Bæði málið um inntøkutrygdina og tilfeingisgjaldið eru mál, sum hesir tríggir flokkar kunnu gjøgnumføra. Men tað verður ikki gjørt saman við Fólkaflokkinum. Samstarv millum hesar tríggjar flokkar má so merkja, at fullveldispolitikkurin er lagdur til viks - og at vit aftur fáa okkurt slag av stig-fyristig politikki, sum alt frá tjóðveldi til samband kann taka undir við.

Kanska politiska skipanin umsíðir hevur lært seg at arbeiða við minnilutastýri stuðulsflokki?

**»Føra veruligan politikk saman við Tjóðveldi**



# Gera nógv burtur úr Livari

Í annaðkvøld klokkan 21.15 kemur Livar Nysted heimaftur til Føroya – eftir ferðina við Artemis Investments tvørtur um Atlantshav.

Hesum ætlar Hvannasunds kommuna at gera nógv burturúr. Tá bussurin við Livari og fylgi er komin norður í Sund – allarhelst um 23 tíðina, skipar Hvannasunds kommuna fyri móttøkur fyri Livari.

Á skránni verða røður, sangur og tónleikur – og hovi verður at heilsa upp á Livar.

Kommunan hevur skipað fyri, at eitt tjald er sett upp miðskeiðis í Hvannasundi – nærhendis heiminum hjá Livari – og í tjaldinum verður drekka og køka og ein gestabók, har høvi verður at skriva eina heilsu til Livar, siga tey úr Hvannasunds kommunu.

Eisini Summar Festivalurin fer at heiðra Livar Nysted og heimsmet hansara. Hetta verður á stórapalli beint fyri at Shubidua skulu spæla fríggjakvøldið.

– Vit vilja við hesum heiðra Livari Nysted fyri framúr avrikið, sum hann hevur framt, sigur Summar Festivalurin.



**» Skjóta spurvar við kanón**

HENRIK OLD
KJAK Á SÍÐU 13



**» Gjalda fyri at tosa við lækna**

LEIF KNUDSEN
TÍÐARGREIN Á SÍÐU 14

# Høgni á NBA basketballspæli

Spælið verður útgivið um allan heim ,og eittnú hin kendi Snoop Dogg er eisini við.

HOGNI alias Høgni Lisberg, hevur fingið lagið »Bow Down (to no man)«, ið er á fløguni HOGNI hare! hare! við á nýggja basketball-spælið NBA 2K11.

Spælið, sum verður útgivið um allan heim frá 5. okt., hevur í ár størstu basketball stjørnuna gjøgnum tíðina við á forsíðuni: Michael Jordan.

Pensioneraði Michael Jordan hevur sagt at hann gleðir seg at koma á vøllin aftur, hóast tað so í hesum førinum er virtuelt, og hann vónar, at fólk fara at fáa tað besta burturúr honum.

Felagið handan spælið, 2K sports, sigur við stoltleika frá, at teir hava samlað besta soundtrackið nakrantíð við stórum høgt virdum nøvnum og teim bestu »upcoming« nøvnunum, sum øll hava ein part av somu orku, ið vit seta í samband við NBA basketball.

Umframt lagið hjá HOGNI eru 28 løg við, m. a frá Big Boi (Outkast), og eitt eksklusivt lag frá sjálvum Snoop Dogg.



Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo